


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Íverksetan, vinnan og umhvørvið hond í hond



ANNIKA OLSEN
Valevni Fólkaflokksins

Vágsbygd má sigast at vera frammaliga, tá ið tað kemur til nýhugsan og íverksetan av nýggjum innovativum fyritøkum. Her hugsi eg serliga um teir slóðbrótandi trollemmarnar og orkusparandi skipsskrúvuna hjá Helga Larsen og nú umhvørvisvinarliga skiljimaskinuna hjá Kaj Joensen, ið skilir oljuna frá vatninum í kjølinum á skipnum og harvið forðar oljuni at fara í havið.

Hesi tøkniligu frambrotini eru ikki bert kærkomin her hjá okkum og kunnu geva arbeiði til nógvar hendur, hetta er tøkni, sum kann seta Føroyar á heimskortið á umhvørvisøkinum, og tískil eigur tílík slóðbrótandi nýhugsan at fáa bestu vælvild frá politisku skipanini.

**Íverksetan**

Tað verður ført fram dagliga, at vit mugu stuðla íverksetarum, tí tað er neyðugt við nýggjum innovativum fyritøkum, ið kunnu økja um føroyska búskapin. Íverksetan er ein long og drúgv tilgongd, líka frá fyrsta hugskotið, til byrjanarkapital og marknaðarføring. Tað er oftani byrjanin, ið er sera trupul, tað tekur tíð hjá marknaðinum at taka ímóti nýggjari tøkni og nýggjari vinnu, og bankarnir standa og bíða eftir, at peningurin kemur aftur í kassan. Landið eigur tískil at føra ein virknan íverksetarapolitikk, sum kann slóða fyri innovatión. Ein møguleiki er at geva íverksetarum ein árligan skattafrádrátt uppá 75-100.000 tey fyrstu 2-3 árini. Eitt skipað samstarv við Samvit eigur at fáast í lag, soleiðis at íverksetarar kunnu fáa ta neyðugu ráðgevingina. Tað eru tó lunnar lagdir undir eina skilagóða íverksetaramentan við eitt nú íverksetarahúsinum í Klaksvík og Ungt Virki, ið er eitt fak í Handilsskúlanum, har næmingarnir fáa frálæru í íverksetan. Men tað er langt á mál, tí eyðsæð er, at nógv góð hugskot standa, tí kapitalurin ikki er til staðar, og eingin kærkomin hjálp til marknaðarføring og ráðgeving, ið er alneyðug í dag.

Vágbingar hava víst í verki, at teir ikki eru fyri einki, men hava viljan og hugskotini til at stovnseta nýggjar vinnur, og landið eigur at stuðla tílíkum tøkniligum frambrotum, sum bæði kunnu vera við til at stuðla vinnulívinum í oynni umframt, at hesar vinnur kunnu vera við til at seta Føroyar á heimskortið á umhvørvispolitiska økinum.

**Føroyskur umhvørvispolitkkur á heimskortið**

Nú Føroyar eru við í Kyoto, og kjakið gongur um niðurskurðin av $CO_2$ utlátinum, kunnu vit við tøknini hjá vábingum vera við til at gera niðurskurð í $CO_2$ útlátinum í øllum heiminum. Tað er ein sannroynd, at skipaflotin er sera dálkandi við $CO_2$ útlátið, og tískil skal nýggj tøkni til fyri at minka um $CO$ 2 útlátið. Heimsins lond hava trupulleikar av $CO_2$ dálkingini, ið stendst av m.a. skipaflotanum, og tískil eiga vit at seta inn her. Taka vit trollemmarnar og skrúvuna hjá vábingum so spara hesi bæði 15-20% hvørt av $CO$ 2 útlátinum. Við hesi tøknuligu útgerð kunnu vit gerast slóðbrótarar á umhvørvisøkinum, um vit bera okkum rætt at.

Skiljimaskinan hjá Kaj Joensen, ið forðar oljuni í kjølinum at fara í havið eigur somuleiðis at fáa størstu politisku vælvild. Um ein tílík maskina kann setast í framleiðslu, kann tað hava við sær nógv arbeiðspláss í oynni, umframt at hetta er við í tí samlaða umhvørvispakkanum hjá føroyingum.

# Blaasvær og valpropaganda



GERHARD LOGNBERGA
løgtingsmaður

Ja so endaði tað við, at Hans Blaasvær bleiv valevni hjá Sjalvsstýrisflokkinum og hevur brúkt hasar óseriøsu undirskriftirnar ímóti Sandoyartunnlinum til valagn, væl hjálptur av Rás 2, sum bara hevur tosað Blaasvær og øðrum til fyrimuns.

Hvat siga tit, sum hava skrivað undir hasa valpropaganduna hjá Blaasvær. Hann hevur hildið nógvar føroyingar fyri gjøldur, brúkt fólk á ein snildan hátt sum valagn.

Á einum lista, sum fólk vilja øvunda suðurøkinum eina góða samferðslu.

Hvør hevur skrivað undir, jú nógv nøvn ganga aftur, og summi snýta og skriva onnur á listan, sum einki vita um tað. Summi skriva annonymt.

Um tín hugsjón í politikki er at steðga útviklinginum á samferðsluøkinum, so er tað til lítlan sóma fyri samfelagið.

Tú kundi kanska lisið meiningina hjá Zacharis Vang um at menna suðurøkið. Hest-Sandoy-Skúvoy og Suðuroy.

Jú annars má eg siga, at tú er farin í rættan flokk, tí Sjálvsstýrisflokkurin hevur speciali í at forfylgja Sandoynni.

Annars er mín erliga meining tann, at teir sum vildu hava Sandoyartunnilin aftur í nevnd, vóru somu ljósasløkkjarir sum Kári P. Højgaard, tí tað hevði verið tann reina sabotasja av málinum, men tíbetur fekk tað "9" atkvøður og varð felt.

Men gott er, Sandoyartunnilin er samtyktur.

Men eftir kommandi val er eingin ivi í míni sál, um Sandoyggin einki umboð eigur á tingi, kunnu vit vinka farvæl til suðurøkið.

Tí biði eg um tína stemmu fyri at verja borg.

Argument hjá teimum, sum vildu eitt valdømi var at beina fyri lokalpolitikki, men hygg eftir hesum fólkum, tey tosa meira lokalt enn nakrantíð.

# Sambandsflokkurin hevur ongantíð verið ábyrgdarleysur, harra Hans Pauli Strøm



JOHAN DAHL
løgtingsmaður

Tað er nógv fyri at lesa greinina hjá H.P Strøm, har hann mest sum bara viðger Sambandsflokkin og okkara støðutakan til tað vitloysið, sum var við at kvala alt vit og skil, tí ávísar fraktiónir av Javnaðarflokkinum (John og Vilhelm), Fólkaflokkinum (Anfinn) og okkara egna flokki (Alfred) av sínum eintingum og í reinum valrúsi og í vóníni at fiska sær nakrar eyka atkvøður, løgdu uppskot fram aftan fyri ryggin á samgonguni

Tá løgmaður ikki var førur fyri at stýra samgongumonnum, hvørki sínum egnu ei heldur restini av uppskotsstillarunum og tryggja, at ikki onnur vitleys uppskot og broytingaruppskot fóru at koma millum 2. og 3. viðgerð av fíggjarlógini, avgjørdi Sambandsflokkurin, sum tann ábyrgdarfulli flokkur vit eru, at siga, nú má steðgast og heldur vaska talvuna reina og so byrja aftur eftir eitt val.

Tað ,at næstu fjúrtan dagarnar ivaleyst vildi blivið til eitt slaraffenland fyri ávísar tingmenn, vildi verið púra ábyrgdarleyst og at slept landskassanum á bláman við fíggjarnevndarformanninum á odda.

Nei, Hans Pauli, so gott spælir klaverið ikki, kanska fyri javnaðarmenn og fólkafloksmenn, men ikki fyri okkum sambandsfólk, vit hava nevniliga bæði dirvi at gera neyðug og góð átøk fyri samfelagið, og tað hava vit eisini víst hesi 4 árini í samgongu við tykkum, men vit hava sanniliga eisini dirvi at siga, nú er nokk, og tað gjørdu vit seinasta hósdag .

Tað var gott fyri Føroyar, at vit tóku hesa avgerð og gott fyri politisku skipanina, men kanska ikki so heppið fyri onkran annan.

Tey mál, sum Hans Pauli nevnir í grein síni, hava onga neyð, hvørki málini um stakar uppihaldarar, sinnisveikaheim í Vági og Havn, bústaðarpakkin, leigulógina, psykriatrilógina sum hevur verið í gildi síðan 1938 , o.s.fr.

Sambandsflokkurin vil tryggja eftir komandi val, at hesi verða løgd fram aftur, tað kann H.P Strøm verða púra vísur í.

Legg beiskleikan á hillina, Hans Pauli, og hygg frameftir, tí beiskleikin terir ongan annan enn teg sjálvan - innanífrá.

# Eldraøkið



EDVA JACOBSEN
Sambandsflokkurin

Eitt av hjartamálunum hjá Sambandsflokkinum er at raðfesta eldraøkið høgt. Vit vilja virka fyri framhaldandi menning og útbygging av heimarøktini, so at tit sum eru blivin eldri kunnu vera longst møguligt heima hjá tykkum sjálvum. Tað vera tó altíð nøkur sum ikki kunnu vera heima, og tí má skipast soleiðis fyri at hildið verður fram við útbyggingum á eldraøkinum, tað veri seg at byggja ellis- og røktarheim, sambýli og íbúðir hóskandi serliga til eldri fólk.

Sambandsflokkurin hevur eisini sum mál, at veita tykkum, sum hava hug og kreftir til tess, møguleika at velja, um tit vilja halda á fram at arbeiða eftir at tit hava rokkið pensjónsaldur. Persónligt frælsi merkir fyri Sambandsflokkin eisini frælsi hjá tí einstaka sjálvur at velja, hvussu leingi ein vil vera á arbeiðsmarknaðinum, av teirri orsøk vil hetta framhaldandi vera eitt av hjartamálunum hjá okkum.

Í tí støðu vit eru í nú við manglandi arbeiðsmegi, hevði tað verið upplagt at fólk í pensjónsaldri, sum hava orku til tess, fáa møguleika at arbeiða longur og harvið vera við til at loysa trupulleikan hesum viðvíkjandi. Ynskiligt hevði verið um hettar ikki ávirkaði pensjónina, soleiðis at tit ikki mistu viðbótina við at vera verandi á arbeiðsmarknaðinum. Tað hevði gjørt tað meira hugaligt hjá tykkum framhaldandi at vera í vinnu. Tað er eitt hjartamál at hyggja nærri upp á hesi viðurskifti.

Tað er sera týdningarmikið at eldraøkið verður raðfest høgt, tí tað eru tit sum hava syrgt fyri at samfelagshjólini hava malið, soleiðis at Føroyar í dag eru eitt vælferðarsamfelag, sum vit mugu gera alt fyri at varðveita. Tað gera vit best við at velja ein sterkan Sambandsflokk inn á ting. Tá verður tryggleiki, framburður og vælferðin hjá tí einstaka sett í hásæti.